# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

Landsliðið

## Fótbóltur á Svangaskarði 10. juni 1997

*Á Svangaskarði spæla teir í dag*
*Har landsliðið og Malta leika har,*
*og hendan sera vakra sólskinsdag*
*har fólk í túsund tali hava leita sær.*

*Og Føroyakvinnur vakrar eru tit,*
*og arbeiða við gleði, strev og slit,*
*og gentur, dreingir uppala vit,*
*til sterkastu og vøkur ítróttarlið.*

*Og menninir við vøllin standa hjá,*
*teir fylgja við um nakar skorar mál,*
*og tað vil gleða okkum øll,*
*um teir nú vunnu her á heimavøll.*

*Ja kappingin er nú sera hørð,*
*eitt gult kort og annar útvístur er,*
*men tiggjumannaliði nú,*
*tvey eitt mál til Føroyar í vakrasta skrúð.*

**Kata**

# Vigdis og Magni í Smiðjuni

Fríggjadagin 29. juni verður listaframsýning við klippmyndum og akvarellum í Smiðjuni í Lítluvík.

Tað eru tey bæði listafólkini Vigdis Sigmundsdóttir og Magni Dalsgaard, sum sína fram. Vigdis er kend fyri sínar klippmyndir, hon hevur sýnt fram í Føroyum, Danmark, Íslandi og í Noregi. Mest kendar eru myndirnar, úr kvæðinum um Ormin Langa, hesar eru prentaðar sum frímerki. Klippmyndirnar á hesu framsýningini eru landslagsmyndir úr Føroyum.

Magni hevur akvarelmálningar úr Føroyum, tað eru landsløg og bygningar, ið eru myndaevni. Hann hevur sýnt fram í Føroyum og Danmark. Eisini hava tey fyrr sýnt fram saman.

Vigdis er dóttir navnframa listamannin Sigmund Petersen. Magni er uppvaksin í grannalagnum hjá Sigmundi og hevur fingið stóran íblástur haðani. Viðmerkjast skal at Magni og Vigdis eru sytskynarbørn.

Framsýningin letur upp fríggjadagin 29. juni kl. 16. Leygardagin kl. 14 verður fernisering. Opið er annars frá kl. 14 til 18 í døgunum til og við týsdagin 3. juli 2007.



*Listafólkini Vigdis Sigmundsdóttir og Magni Dalsgaard lata fríggjadagin upp eina framsýning við klippmyndum og akvarellum í Smiðjuni*

## Prógv



Í dag hevur Ingálvur av Reyni Jøkladal lokið BA prógv á Ergoterapeutuddannelsen i København.

**85 ára føðingardagur**



Tann 29. juni 2007 verður KFUK í Havn 85 ár. Vit halda føðingardagin sama dag í KFUK kl. 19. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Fyri 35 árum síðan:

# Stýrimenn í 1972



Í juli 1972 fingu hesir sjey stýrimenninir prógv á Føroya Sjómansskúla:
*Absalon Páll Lydersen, Klaksvík, Kaj Pauli Mortensen, Tvøroyri, Suni Lamhauge, Glyvrar, Finnbogi Niclasen, Tvøroyri, Karl Jonfeldt Jacobsen, Glyvrar, Atli Nolsøe Hansen, Tórshavn, og Jógvan Olsen, Sandavágur*

*Kelda: Myndaárbókin - árið ið fór 1972*